

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 09 - 2012

# Ársins Virki 2012 er PF Luna

Á Vinnudegnum, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum fríggjadagin, varð avdúkað, at P/F Luna hevur fingið heiðurin sum Ársins Virki 2012. Dómsnevndin legði m.a. dent á tey fíggjarligu úrslitini hjá fyritøkuni, og at P/F Luna støðugt hevur ment sítt virksemi, bæði innan framleiðslu og marknaðarføring. Mynd Teir tríggir Gregersen brøðurnir, Páll, Regin og Atli, sum standa aftanfyri alifyritøkuna Luna.